

*Í eitt ár hevur Páll Nolsøe verið nærmasti ráðgevin hjá Kaj Leo Johannesen. Hann vil tó ikki kallast spinndoktari*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

eg ikki sigi nakað, sum eg ikki vildi endurtikið alment. Eg havi talufrælsi, sum øll onnur, men eg skal vera partapolitisk óheftur í mínum starvi. Og betri er at vera fyrivarin, staðfestir Páll Nolsøe.

Spurdur um tað ikki kann vera torført, er hann rættiliga avgjørdur.

– Tað er ein spurningur um at vísa arbeiðinum virðing og at vera fakligur. Tað er ongantíð meiningin, at eg skal skapa politikk. Eg skal hjálpa til at formidla politikkin, sum løgmaður og samgongan hava sett út í kortið, sigur Páll Nolsøe.

Víðari greiðir hann frá, at hann, á sama hátt sum onnur embætisfólk, noyðist at vera ansin við at úttala seg um viðurskifti, sum kunnu ávirka politisku støðuna í landinum.

## Má fylgja við

Men hvussu er so ein vanligur dagur, sum kunningarráðgevi hjá Kaj Leo Johannesen?

– Fyrst á morgni plaga eg og løgmaður at møtast um okkurt er á skránni ella hent. Ein av uppgávunum er sjálvandi at fylgja við í miðlunum, hvat er á dagsskránni hesar dagarnar. Partur av at fylgja við í fjølmiðlunum er at vera framskygdur og royna at meta um, hvørjar søgur kunnu koma og hvussu tær kunnu útvikla seg og harvið fyrireika løgmann, hvat kann verða í væntu, og eg má erliga viðganga, at tað helst eru onnur, sum verða kløkkari enn eg, tá okkurt kemur fram, staðfestir hann.

– Men stingur okkurt óvæntað seg upp, so má mann verða skjótur, tí øll rokna við, at løgmaður kennir til øll mál, greiðir Páll Nolsøe frá.

## Røðurnar fylla

Men útyvir tað dagliga rumblið á

*– Onkuntíð havi eg hugsað, at tingini kundu verið søgd eitt sindur øðrvísi*

Løgmansskrivstovuni, so eru tað tvær hendingar, sum fylla rættiliga nógv í arbeiðnum hjá ráðgeva løgmans.

– Nýggjársrøðan og serliga ólavsøkurøðan fylla rættiliga nógv. Tað er nakað vit brúka nógva tíð uppá, og sum er ein stór avbjóðing, tí har skulu orð setast á politikkin hjá landsstýrinum og samgonguni. Hesar røður eru eisini eitt fundament og ein høvuðspallur undir framberingini av politikkinum hjá landsstýrinum. Ongin politikari fær so stóran eksponering, sum løgmaður fær við hesum røðum, og ongin politikari fær sama møguleika at røkka út til so nógv fólk. Og røðurnar verða vendar og snaraðar og tað verður skotið eftir røðunum. So teksturin má vera góður og hvassur, sigur Páll Nolsøe.

Hann greiðir víðari frá, at tá løgmaður endiliga ber hana fram, er tað ein serlig løta fyri seg.

– Mann fylgir væl við, hvussu hon verður borðin fram, og eg havi enn ikki verið vónbrotin, staðfestir hann.

Páll Nolsøe staðfestir eisini, at hóast hann ongantíð fær rós alment fyri sítt arbeiði so síggjast ofta tekin, hvussu ymisku úrslitini verða móttikin í ummælum av røðum og í politiskum greiningum.

## Ikki eitt lívsstarv

Hóast Páll Nolsøe leggur dent á, at hann er í einum spennandi starvi, har ongin dagur er eins, so verður hann ikki kunningarráðgevi hjá løgmanni í allari framtíð.

– Eg eri av tí fatan, at mann ikki skal vera ov leingi í einum starvi. Framhald er týdningarmikið summum størvum, men ikki í hesum. Hevði tað verið sami kunningarráðgevi hjá løgmanni í ein mansaldur, so hevði tað helst gingið útyvir dygdina av arbeiðinum, og tað kundi blivið litað. Um mann vil tað ella ikki, so setur mann síni fingramerki í hesum starvi og fyrr ella seinni má tað nýtt blóð til, metir Páll Nolsøe, sum í eitt ár hevur verið nærmasti ráðgevi Kaj Leo Johannesen.